

# Lohan LIÐUG SUM BLONDINA

Amerikanski sjónleikarin Lindsay Lohan, sum er kend frá filmum sum Mean Girls og nýggja Herbie-filminum, vísir seg nú fram í Hollywood við nýggjum hárliti. Hon er kend sum ein blondina á hvíta tjaldinum, men hon hevur eftir øllum at døma havt brúk fyri ein broyting, tí hárið er klipt og litað myrkt.

Lindsay Lohan skal eisini spæla við í einum nýggjum filmi, sum er eitt sindur øðrvísi enn teir løttu skemtifilmarnir, sum hon hevur verið við í seinastu árini. Hon skal spæla við í einum nýggjum filmi, sum snýr seg um drápið á bretska tónleikaran John Lennon.

Filmurin kallast Chapter 27, og Lohan skal spæla ein fjeppari hjá Lennon, sum eisini verður vinfólk við drápsmannin Mark David Chapman, stutt áðrenn hann skjýtur Lennon til deyðis í New York.

Upptøkurnar til hendan filmin verða væntandi gjørdar tíðliga næsta ár.

*Tann nú myrkhærda Linsday Lohan skal í næstum verða við í filmi um drápið á John Lennon*



*Soleiðis hevur tað verið meira vanligt, at Lohan hevur sæð út seinnu árini – her til frumsýningina av filminum Mr. & Mrs. Smith*

## HITLIST

### 15 tær bestu (ÚF)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Páll Finnur Páll | Herbergið |
| 2 | Pipar & Salt | Høm Høm |
| 3 | James Blunt | You're Beautiful |
| 4 | Paradox | The Innocence Of Childhood |
| 5 | Nephew | Byens Hotel |
| 6 | Nephew | Worst/Best Case Scenario |
| 7 | The Dreams | I'll Be There |
| 8 | The Rasmus | No Fear |
| 9 | Bon Jovi | Have a Nice Day |
| 10 | Kelly Clarkson | Behind These Hazel Eyes |
| 11 | Gestir | Heimloysi |
| 12 | Kim Hansen | Maria |
| 13 | Sugababes | Push The Buttom |
| 14 | Rihanna | Pon De Replay |
| 15 | Franz Ferdinand | Do You Want To |

### Tjeklisten (DR)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Mew | The Zookeper´s Boy |
| 2 | Outlandish | Look Into My Eyes |
| 3 | Robbie Williams | Tripping |
| 4 | Nephew | Byens Hotel |
| 5 | Depeche Mode | Precious |
| 6 | Sugababes | Push The Buttom |
| 7 | Gavin DeGraw | Chariot |
| 8 | Cardigans | I Need Some Fine Wine and You, You... |
| 9 | Kashmir | The Curse of Being a Girl |
| 10 | Tue West | Vent på mine sange |
| 11 | James Blunt | You're Beautiful |
| 12 | D:A:D | Hey Now |
| 13 | Carpark North | Fireworks |
| 14 | t.A.T.u. | All About Us |
| 15 | Kanye West ft. J. Fox | Gold Digger |
| 16 | Kelly Clarkson | Behind These Hazel Eyes |
| 17 | Tina Dickow | Give In |
| 18 | Pussycat Dolls ft. Busta Rhymes | Don't Cha |
| 19 | Kaiser Chiefs | I Predict A Riot |
| 20 | L.O.C. | Frk. Escobar |

### Top of the Pops (BBC)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Westlife | You Raise Me Up |
| 2 | Arctic Monkeys | I Bet Your Look Good On The Dancefloor |
| 3 | Pharrel Williams ft. Gwen S. | Can I Have It Like That |
| 4 | Craig David | Don't Love You No More |
| 5 | Sugababes | Push The Button |
| 6 | Pussycat Dolls ft. Busta Rhymes | Don't Cha |
| 7 | Robbie Williams | Tripping |
| 8 | Kate Bush | King Of The Mountain |
| 9 | Goldfrapp | Number 1 |
| 10 | Hilary Duff | Wake Up |
| 11 | Rosetta Life ft. Billy Bragg | We Laughed |
| 12 | Bob Sinclair ft. Gary Nesta Pine | Love Generation |
| 13 | Texas | Can't Resist |
| 14 | Eurythmics | I've Got A Life |
| 15 | Darren Hayes | So Beutiful |
| 16 | Kayne West ft. Jamie Foxx | Gold Digger |
| 17 | Daniel Powter | Bad Day |
| 18 | Friday Hill | Baby Goodbye |
| 19 | Sean Paul | We Be Burning |
| 20 | Fightstar | Grand Unification (Part 1) |

### Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kayne West ft. Jamie Foxx | Gold Digger |
| 2 | Chris Brown | Run It |
| 3 | The Black Eyed Peas | My Humps |
| 4 | Young Jeezy ft. Akon | Soul Survivor |
| 5 | Nickelback | Photograph |
| 6 | Sean Paul | We Be Burnin' |
| 7 | Bow Wow ft. Ciara | Like You |
| 8 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 9 | Mariah Carey | Shake It Off |
| 10 | Fall Out Boy | Sugar, We're Goin' Down |
| 11 | T-Pain | I'm Sprung |
| 12 | Green Day | Wake Me Up When September Ends |
| 13 | Lifehouse | You And Me |
| 14 | Pretty Ricky | Your Body |
| 15 | Weezer | Beverly Hills |
| 16 | Twista ft. Trey Songz | Girl Tonite |
| 17 | David Banner | Play |
| 18 | D4L | Laffy Taffy |
| 19 | Three 6 Mafia ft. Young Buck.. | Stay Fly |
| 20 | Dem Franchize Boyz ft. J. Dupri.. | I Think They Like Me |

# NICOLE BANGIN FYRI AT KOYRA



Nicole Riche, sum var við í reality-røðini Simple Life saman við Paris Hilton, er fullgreið yvir, hvat teir bestu handlarnir liggja í Beverly Hills, og henni dámar væl at vera til handils, men hon bebbarædd fyri at koyra til handlarnar. Hon sigur, at hon verður fjálturstungin, tá ið hon koyrir saman við vinkonum, og tær tosa í fartelefon, meðan tær koyra. Tí hevur Nicole Richie nú keypt sær eina íbúð, sum liggur mitt í Beverly Hills, og tí sleppur hon frá at koyra, tá ið hon skal til handils.

# Clooney tímir ikki ROMANTISKAR FILMAR

Sjónleikarin George Clooney ætlar sær ikki at spæla við í fleiri romantiskum filmum. Hann sigur, at hann ætlar sær ikki at enda sum ein 60 ára gamal maður, sum spælir romantiskar filmar við ungum kvinnum. Clooney hevur spælt við í nógvum slíkum filmum, men hann vónar, at tað ikki verða fleiri av tí slagnum. Í næsta mánaði koma tveir filmar við Clooney. Annar er Good Night And Good Luck, har hann spælir leiklutin sum ein tíðindavertur, og hin er Syriana, har hann er ein CIA-starvsmaður.





# Kylie STRÍÐST ÍMÓTI KRABANMEINI

Australska songkvinnan Kylie Minogue hevur ikki havt tað lætt seinastu tíðina. Í mai mánaði fekk hon staðfest krabbabein í bróstinum, og nýggjastu kanningarnar vísa, at Kylie framvegis ikki er blivin frísk. 36 ára gamla Kylie hevur fingið kemo-viðgerð, og hon hevur goymt seg fyri almenninginum tað mesta av hesari tíðini. Tað tykist tó, sum at Kylie er troytt av at goyma seg, tí hon hevur verið at sæð úti millum fólk í Paris seinastu tíðina. Hon hevur verið í fylgi við mammu sínari Carol, og tað hava myndamenn sjálvandi fingið myndir av.

(Mynd: Scanpix)